DAGSINS MEINING

Ein sigur hevur hundrað pápar …

Eitt útlendskt orðatak sigur, at eitt tap er foreldraloysingur, meðan ein sigur hevur hundrað pápar. Hvussu ofta sær man ikki troðkan at taka sær heiðurin av onkrum væleydnaðum, og eina tilsvarandi troðkan við hondvaskið, tá ábyrgdin av einum mistaki skal finnast.

Loysnin, har Føroya Fiskavirking var stovnað, var ein djørv, kollveltandi og ikki minst væleydnað loysn, ið gjørdi sítt til at vit komu so væl fyri okkum eftir kreppuna. Sum við teimum flestu djørvu og kollveltandi loysnunum, so vóru borgarligu afturhaldsflokkarnir Fólkaflokkurin og Sambandsflokkurin ímóti.

Fólkaflokkurin var so mikið hart ímóti, at hann sleit samgonguna uppá málið um Fiskavirking. Enn eitt dømi um, hvussu hesin flokkur kann skara framúr við at taka feil, tá um vinnu ræður.

Tá var tað ryggurin í samgonguni undir Maritu Petersen sálu sum løgmanni, ið tryggjaði loysnuna við Fiskavirking. Høvdu Javnaðarflokkurin, Tjóðveldisflokkurin og Sjálvstýris-flokkurin ikki tá víst dirvi til at fremja hesa loysn, so var einki Fiskavirking í dag, og tað hevði verið betýðiligt tyngri at komið úr kreppuni. Hetta vildi snøgt sagt verið ein vanlukka fyri støð sum Vestmanna, Miðvág, Runavík og Toftir. Ironiskt nokk eru hesi støð sambandsháborgir, hóast Sambandsflokkurin vísti sítt vanliga afturhaldni í verki við at atkvøða ímóti tí loysn, ið tryggjaði 10 ára framgongd í hesum økjum.

Tíðirnar vóru sera ringar, og tí var tað harður kostur, ið skuldi til at venda gongdini. Hetta hevði Fólkaflokkurin ikki rygg til tá, men tað forðar honum eftir øllum at døma ikki í at taka heiðurin fyri Fiskavirking. Tað eru guds børn, ið batna, og er tað gott, at Fólkaflokkurin nú viðgongur, at teir slitu táverandi samgongu á skeivum grundarlagi.

Fiskavirking var ein neyðug loysn fyri fiskiídnaðin á landi. Tað var ongantíð uppá tal at knýta skipaflotan til hesa loysn, og tí er tað einki annað enn skuggaboksing, tá Bjarni Djurholm sigur hetta í valgrein. Fólkaflokkurin roynir í valretorikki at pynta seg við læntum fjaðrum í málinum um Fiskavirking. Stutt kann minnið verða, men máti skal verða við øllum.

Sosialurin

VIÐMERKINGAR

Yvirdosis av C-vitaminum

Vegna grein hjá John Johannessen (gev tónleikinum c-vitaminir)

Rógvi á Rógvu

John Johannessen tosar um at menna tónleikin eitt nú við at stuðla og marknaðarføra føroyskan popp tónleik til útlendskan marknað, tað haldi eg at vit skulu lata plátufeløg taka sær av. Tað er rætt at brúk er fyri meira stuðuli til at menna tónleikin og tónleikaumstøðurnar, men skal tað gerast rætt, skal tað stuðlast her heima. Tónlistin skal stuðlast, og má tann skapandi listin verða í hásæti og hava frælsi til at mennast til tað hon vil, uttan nakra politiska ávirkan, so fáa vit eina serstaka og fjølbroytta tónlist á einum høgum støði sum er til gagns fyri øll, eisini politikarar.

Tað hevur stóran týdning at góðar arbeiðsumstøður verða skaptar fyri tónleikarar her heima, fleiri venjingarhølir fyri bólkar og einstaklingar, ein enn betri musikkskúla, og ikki minst tónleikapallar (konserthús og arbeiðspláss fyri tónleikarar), har tónleikarar og áhoyrarar kunnu mennast. Hettar er ein breið og effektiv loysn sum fer at geva stórt listarligt avkast, og tá kunnu vit saktans reypa um eina ríka tónleikamentan.

Watergate og Frostgate

(ískoyti til viðmerking mína um SVF og valstríð)

Jón Tyril

Eftir at fleiri hava vent sær til mín, sum ikki skiltu hvat eg meinti við, at Øssur Winthereig var »løddur« politiskt, kenni eg meg noyddan at útdýpa tann pástandin. Besti máti at gera tað, er at samanlíkna við vælkendu Watergate Gøluna.

Teir báðir tíðindamenningar Bernstein og Woodward avdúkaðu gøluna, sum førdi til, at Nixon forseti legði frá sær. Um vit hugsa okkum at forsetaval bleiv útskrivað minni enn tveir mánaðar eftir at gølan var avdúkað. At Nixon sjálvur skuldi vera við í valdystinum. Og at partamenn Nixons alment høvdu lagt ímynda okkum, at bert eittans sjónvarpsrás var í USA, eins og hjá okkum. So er tað tó ógjørligt hjá mær at ímynda mær at Bernstein ella Woodward høvdu verið bidnir at vera vertir fyri eftirfylgjandi valdystinum í sjónvarpi. Hetta tí, at hóast teir báðir vóru framúr góðir tíð-indamenn, og hava verið mongum fyrimyndir síðan avdúkingarnar, so høvdu teir verið alt ov "løddir", ladaðir politist, til at tað hevði verið forsvarligt at givið øðrum av teimum leiklutin at stýra amerikanska valinum. Fólk høvdu havt ilt við at sæð ígjøgnum teirra leiklutir undan valinum. Teir høvdu verið litaðir í fólksins eygum og sjálvandi serliga í eygunum hjá partamonnum Nixons. Teir høvdu verið løddir við politikki. Og fólk høvdu hildið teir runnið ørindi fyri mótstøðumenn Nixons, hóast teir ikki gjørdu tað. Tí vildi tað verið sera stutthugsað og óheppi av sjónvarpsrásini at sett annan av teimum í starv sum vert fyri valstriðnum. Bæði fyri trúviriði sjónvarpsins, fyri trúviriði hjá tídindamonnunum sjálvum og fyri allan valdystins skuld. Á júst sama hátt meti eg, at Øssur Winthereig, hóast framúr journalistiskar dygdir, er alt ov politist løddur til at stýra føroyska valkjakinum 2004. Hetta var tað mítt bræv snúði seg um fyrst og fremst.

P.S. Eg skuldi ikki havt byrjað mítt skriv við at finnast at øðrum viðurskiftum við sendingunum, so sum stoppuri og øðrum. Tað hevur ørkymlað fleiri og forða teimum at sæð hvat eg meinti við.

Loppumarknaður og neyðstødd

TÍÐINDASKRIV

Neyðin er stór kring heimin og Reyði Krossur Føroya er við í fleiri hjálpartiltøkum.

Leygardagin 10. januar kl. 10-14.30 fer Reyði Krossur at hava loppumarknað til frama fyri hjálpararbeiði, marknaðurin verður í húsum felagsins í Vágsbotni í Havn. Reyði Krossur hevur roynt hetta 3 ferðir og undirtøkan hevur verið góð. Ætlanin er at hava hetta tiltak nakrar ferðir um árið og næstu ferð verður leygardagin 6. februar.

Tikið verður móti smálutum fríggjadagin kl. 17-19.

Sosialurin

Sosialurin
Stovnaður: 1927
Ábyrgdarblaðstjóri: Jan Müller
jan@sosialurin.fo
Blaðstjóri: Eirikur Lindenskov
eirikur@sosialurin.fo
Figgjarleiðari: Jákup Mørk
jakup@sosialurin.fo

Marknaðardeild: lysing@sosialurin.fo
Finnbjørg Nattestad
finnbjorg@sosialurin.fo
Durita Simonsen durita@sosialurin.fo

Blaðfólk:
Áki Bertholdsen aki@sosialurin.fo
Eyðun Klakstein eydun@sosialurin.fo
Edvard Joensen edvard@sosialurin.fo
Heri á Rógvi heri@sosialurin.fo
Ingrid Bjarnastein ingrid@sosialurin.fo
Vilmund Jacobsen vilmund@sosialurin.fo
Solby Eliasen solby@sosialurin.fo
Dagfinn Olsen dagfinn@sosialurin.fo
Ingi Rasmussen ingi@sosialurin.fo
Magnus Gunnarsson maggi@sosialurin.fo

Ítróttur:
Jákup Mørk jakup@sosialurin.fo

Myndameni:
Álvur Haraldsen alvur@sosialurin.fo
Jens Kristian Vang jensk@sosialurin.fo

Sosialurin í Norðoyggjum:
Postsmoga 231
Nólsoyar Pálsgøta 1, 700 Klaksvík
tel. 458686 fax 458687
e-post: klaksvik@sosialurin.fo
Sosialurin í Suðuroy:
tel. 375364 fax 375464
tel. 220727
e-post: aki@sosialurin.fo
e-post: dagfinn@sosialurin.fo
Sosialurin í Eysturoy:
Postsmoga 143, Saltangará
tel. 447820 fax 449520
tel. 228909
e-post: vilmund@sosialurin.fo
Sosialurin í Vágum:
360 Sandavágur
tel. 333820, 220507 fax 333720
e-post: edvard@sosialurin.fo
e-post: vagar@sosialurin.fo

Uppseting/prent:
Uppseting: Hestprent
Prent: Prentmiðstaðin
Útgevari:
Sp/f Sosialurin
Avgreiðsla:
Mán.-fri. 8-16
Argjavegur 26,
Tel. 341800, Fax 341801
Postadressa:
Postboks 76, 110 Tórshavn
E-mail:
post@sosialurin.fo
lysing@sosialurin.fo
lysingartorg@sosialurin.fo
varp@sosialurin.fo

Blaðið verður prentað
mánadag-friggjadag klokkan 14^{00}

Lýsingar

Freistir:	Tekstlýsingar	Størri lýsingar	Lýsingartorgið	Heilsanir
Týsdagsblaðið	Mán.kl. 10	Frí. kl. 15	Frí. kl. 12	Frí. kl. 12
Mikudagsblaðið	Týs. kl. 10	Mán. kl. 15	Mán. kl. 12	Mán. kl. 12
Hósdagsblaðið	Mik. kl. 10	Týs. kl. 15	Týs. kl. 12	Týs. kl. 12
Friggjadagsblaðið	Hós. kl. 10	Mik. kl. 15	Mik. kl. 12	Mik. kl. 12
Leygardagsblaðið	Frí. kl. 10	Hós. kl. 15	Hós. kl. 12	Hós. kl. 12

Størri lýsingar, sum nógv arbeiði stendst av, mugu vera inni í góðari tíð og áðrenn ásettu freistir.
Framíhjápláss má umbiðjast í góðari tíð.

Stødd:
Ein heil síða í Sosialinum er 254 mm breið og 346 mm í hædd. Breiddin á einum teigi er 39mm og rúmið millum teigarnar er 4mm.

Innsent tilfar
Fult navn skal vera undir innsendum tilfari. Innsendar greinar, har blaðleiðslan ikki er kunnað um bústað og telefonnummar, verða ikki settar í blaðið.

VIÐMERKINGAR

Ummæli

Heri Mohr

Í bókahandlunum er komin nýggj bók um einarædisharran Jósef Stalin, skrivað av rithøvundanum Hanusi Kamban, sum telist millum okkara bestu pennar.

Í formælinum til bókina (síðu 10) lesa vit m.a., at Jan Müller hevur givið bókina út, og at Valdemar Dalsgaard hevur stavsett persónsnøvn, staðarnøvn og einstøk russisk orð. Í formælinum verður eisini sagt, at bókin snýr seg um *Jósef Vissarionovitsj Dzugasjvil, tann fátæka drongin úr Gori í Georgia, sum tíðliga gjørdist kollveltingarmaður og limur í tí lítla russiska, sosialdemokratiska flokkinum.* Hann fekk størri vald enn nakar valdsharri í heiminum nakrantíð hevði havt. Vit fáa at vita, at bókin er skrivað fyri at laga upp í tað glopp av vantandi kunnleika, sum valdar, ikki minst í Føroyum, um hetta evni. Bókin styðjar seg til verandi bókmentir, einamest á enskum.

Støðið undir teimum 108 síðunum við 25 bílætum skuldi so statt verið í lagi. Væl vitandi, at tann kommunistiska epokan, sum við Stalini á odda í 22 ár píndi og drap ótaldar millióndir av russarum, ikki kann komprimerast við sporadiskum brotum í einum bóklingi, so verður tó lisið við áhuga, tí tað frálíka portrettið av Janusi, sum Hanus Andreassen (nú Kamban) legði frá hondum: *J. H. O. Djurhuus, Ein bókmentalig ævisøga,* liggur okkum frammaliga í huganum.

Av tí at henda lítla bókin er heimssøgufrøðilig, er tað kanska í so ósmættið av leikmanni at ditta sær, sum ein annar spurvur í tranadansi, at trína inn á pallin á parnassinum, har professionellir ummælarar og annað gott fólk innan bókmentum haldur til.

Lat tað verða sagt beinanvegin, at bókin er eitt skuffilsi, eitt vónbrot. Tá hon er lisin og løgd á reólina, har hon hoyrir heima, koma fram assosiatiónir um tann unga, alfaðirliga seminaristin, sum sannførandi og doserandi gevur næmingunum dispositión til ein torføran fristíl.

Fyrst er at siga, at bókin hevur ongar myndakeldur, ongar notur og onki bókmentayvirlit.

Á síðu 107-108 er tó eitt yvirlit: *BÓKMENTIR - eitt úrval,* sum ikki kann brúkast til nakað, hvørki eitt ella annað, við ávísum feilum: Bókin hjá Alan Bullock, *Hitler & Stalin, Beretningen om to af dette århundredes grusomste magtmennesker,* kom út á Politikens Forlag 1991 og ikki 1992. Bókin hjá Lord Russel of Liverpool, *Scourge of the Swastika, A Short History of Nazi War Chrimes,* Green Books, London 2002, kom út í danskari týðing í 1984 (MCMLXXXIV) við heitinum *Hagekorsets Svøbe. Beretningen om de nazistiske krigsforbrydelser.* Um hana er at siga, at hon lítið ella einki hevur við Stalin at gera. Bókin hjá Adam B.Ulam, *The Man and His Era, Lane 1974, kom út, expanded edition,* í 1989.

Á síðu 14 í bókini lesa vit, at *vanliga verður upplýst, at Stalin er føddur í desember 1879…Veruleikin*

er, at hann varð føddur tann 6. desember 1878. Hvaðani rithøvundurin hevur fingið "veruleikan", fáa vit ikki at vita, men í tí donsku enclypodæiini (2000) lesa vit, at Stalin varð føddur 21. desember 1879(?).

Hvørjum skulu vit trúgva? Hanus Kamban ella leksikon.

Hóast serkønur maður í russiskum hevur hjálpt rithøvundanum við at stavseta staðarnøvn, verður høvuðsstaðurin í Georgia, Tbilisi, skrivaður Tiflis (á týskum) (síðu 17).

Tað er frustrerandi at lesa um russiskar bøkur við hugsaðum (fiktivum), føroyskum heitum, hóast allar ella tær flestu, sum soleiðis eru heimadoyptar í bókini, finnast á donskum ella øðrum skandinaviskum máli, sum føroyingar duga at lesa.

Á síðu 37 síggja vit bílæt av Lenin í rullustóli saman við systrini Mariu og einum lækna. Sama bílætið er á síðu 125 í bókini *Russiske Billeder,* sum Gyldendal gav út í 1995, og har fáa vit at vita, at 40 læknar og sjúkrasystrar vóru um Lenin, meðan hann var sjúkur.

Í fororðinum til bókina skrivar viðkanda skaldið Jevgenij Jevtusjenko m.a. um nevnda bílæt: *Det sidste billede av Lenin i denne bog er overvældende. Hans øjne udstråler rædsel, måske fordi han har indset, at alle revulotionens idealer skylles bort i strømme af blod.* Fororðið endar við hansara vøkru yrking: *Et kludetæppe.*

Á síðunum 77-80 lesa vit um Geørgij Zjukov, sum gjørdist ein tann kendasti herovastin í bardaganum um Stalingrad og í endaliga bardaganum, sum gjørdi enda á Týskland við hertøku av tí, sum einaferð var Berlin. Men vit fáa ikki at vita, *at* Zjukov tók ímóti tí endaligu kapitulatiónini, tá Týskland gav seg yvir tann 8. mai 1945, at tað tá kom vátt í reiðrið millum hann og Stalin, og at hann gjørdist verjumálaráðharri hjá Nikita Krusjtov miðskeiðis í 50-unum.

Á síðu 92 er eitt stykki, ið eitur: *Stalin myrdur?* Har lesa vit m.a., at lagsbrøður og eltibløðrur valdsharrans noyddust at vera um teirra meistara at kalla hvørja nátt. Seks av teimum verða nevndir, men Malenkov er ikki teirra millum. Tað kann tykjast løgið, tí hann var ovarlaga í brotsmannalig øjnene og kastede et blik på alle i værelset. Det var et frygteligt blik, vanvittigt eller måske vredt og fuldt af dødsangst…

Så skete der noget uforståeligt og frygteligt, som jeg den dag i dag ikke kan glemme…

Han løftede pludselig sin venstre hånd, som om han pegede på noget ovenover og nedbragte en forbandelse over os alle. Bevægelsen var uforståelig og fuld af trussel…

I næste øjeblik, efter en sidste anstrengelse, vred ænden sig fri af kødet.

Frágreiðingin hjá Svetlanu um deyðsræðslu og ta vinstru hondina hjá pápanum sigur kanska okkurt um tann dulda sannleikan um sálarliga sjúka bølmennið Jósef Stalin? - Annar armurin hjá honum var eitt sindur kryplaður!

Um tey skakandi rættarmálini í 1936-38, har vitnisburður varð fingin til vega við píning og torturi, vísir rithøvundurin á, at hesi mál kunnu sammetast við líknandi, sum fór fram í miðøldini.

Skrivligu referatini frá Moskvaprocessunum prógva pástandin til fulnar, men tað, sum í hesum sambandi eisini hevur áhuga, er, at almenni ákærarin Andrej Vysjinskij, sum framdi tey óhugnaligu justitsmorðini, varð leiðari av sovjetisku ST-delegatiónini í 1947, til hann doyði í 1954. Hendan delegatiónin átti sín stóra leiklut í tí kalda krígnum.

Í formælinum og í sjálvari bókini verður sagt, at í heila tikið er merkiliga lítið skrivað um Stalin og stalinismuna. Tað er at taka munnin í so fullan, tí um vit tríva í bókarúgvuna og t.d. blaða í bókini hjá Allan Bullock (1088 síður), so eru í henni fleiri hundrað nøvn og heiti í einum evnisyvirliti, sum hevur samband við skriving um Hitler og Stalin.

Í 2002 kom bókin *Lad os blive som solen. Den russiske sølvalder 1890-1917* av Mette Dalsgaard, ph.d. í russiskari bókmentafrøði. Hon er verd at lesa. Tá ið tað stóra russiska skaldið Osip Mandelsjtam í 1933 yrkti um *Fjallabúgvan í Kreml* og hansara *maðkafingrar*, hansara *grótlúsagneggj* og hansara girndarboð um deyðarevsing, varð hann beinanvegin handtikin (av Stalini) og sum ein annar brotsmaður jagstraður til tvingsilsarbeiði í Sibiria, har hann í 1938 doyði 47 ára gamal.

Og sama árið kom tann áhugaverda og nóg umrødda bókin *Gulag og Glemsel. Ruslands tragedie og Vestens hukommelsestab i det 20. århundrede* skrivað av Bent Jensen, professara í søgu.

Í bókini *Russiske Billeder* skrivar Jevgenij Jevtusjenko m.a., at Rusland er *en nation af formidable forfattere, geniale videnskabsmænd, pragtfulde bedstemødre….*

Í ár eru liðin 100 ár síðani "formidabla"skaldið Anton Tjekhov doyði bert 44 ára gamal. Lungnasjúka, sum ikki einaferð.

Tað hevði verið hugaligt, um Hanus Kamban kundi markera árið Tjekhov til áminningar við at føroyska nakrar av hansara stuttsøgum ella ein av hansara sjónleikum (*Másan* eiga vit) kanska til GRÍMU at framføra einaferð í heyst?

Búskaparráðið og »búskaparligi veruleikin«

Jóannes Jacobsen

Er marknaðurin Guð?

"Marknaðurin er Guð" er ein av yvirskriftunum í umræðuni Sosialurin hevði av nýggjastu frágreiðingini hjá Búskaparráðnum. Helst er henda yvirskriftin komin í greinina, tí blaðmaðurin, sum skrivaði hana, helt seg kunna lesa "millum linjurnar", at Búskaparráðið hevur eina slíka ideologiska ella religiøsa uppfatan av búskaparligum viðurskiftum. Um so er, at hetta er orsøkin til yvirskriftina, er blaðmaðurin ikki einsamallur. Fleiri halda seg hava sæð vælpussaðar gloriur "millum linjurnar" í nógvum av tí, sum Búskaparráðið borðreiðir við.

Men ongastaðni í nakrari frágreiðing hjá Búskaparráðnum stendur, at marknaðurin er Guð, hvørki á linjunum ella millum linjurnar. Hetta er heilt einfalt so, tí eingin, sum situr í Búskaparráðnum, heldur, at marknaðurin er Guð. Fyri Búskaparráðið er ein marknaður bara ein mekanisma ella tøkni, sum framleiðarar og brúkarar brúka til at samráða seg fram til, hvat skal framleiðast og til hvønn prís. Tann einstaki marknaðurin er heilt einfalt tann samráðingarmekanisma sum natúrligar og tøkniligar bindingar skapa saman við tí regluverkið, sum tað almenna hevur sett upp.

Fyri Búskaparráðið er ein marknaðar tí ikki Guð og tíansheldur rættvísur ella órættvísur. Ein marknaður er eitt tól, sum virkar væl ella illa, hvørki meira ella minni. Og Búskaparráðið sær tað sum ein av sínum fremstu uppgávum at vegleiða politiskar myndugleikar og almenning um, hvussu tann parturin av tí einstaka marknaðinum, sum tað almenna hevur ávirkan á, nevniliga løgliga regluverkið, kann skipast, soleiðis at einstøku marknaðirnir virka so væl sum gjørligt.

Tann, sum vil síggja eitt dømi, har Búskaparráðið hevur gjørt eina (sera væleydnaða) royndar at røkja hesa uppgávu, kann lesa uppskotið hjá ráðnum um ein fiskidagamarknað, sum stendur í várfrágreiðingini fyri ár 2000.

Búskaparfrøðingar og búskaparfrøðingar

Hóast heitið búskaparfrøðingur verður brúkt sum felagsnevnari fyri bæði samfelags-búskaparfrøðingar og virkisbúskaparfrøðingar er sera lítið samband millum tað, sum hesir báðir takast við. Tey fyribrigdi, sum gera seg galdandi fyri heilar vinnur ella alt samfelagið undir einum á aðrari síðuni og fyri ta einstøku fyritøkuna á hinari, eru so ymisk, at læra um virkisbúskaparlig viðurskifti gevur stórt sæð einki innlit í samfelagsbúskaparlig viðurskifti og øvugt.

Samfelagsbúskaparfrøðin, sum Búskaparráðið arbeiðir við, er vísind, sum serliga tekst við marknaðarliga samskifti millum fyritøkur, húsarhald og tað almenna.

Høvuðsspurningar eru, hvørjar vørur og tænastur vera framleiddar, hvussu framleitt verður og hvør fær hvussu nógv av teim ymsu vørunum og tænastunum. Húsarhald, fyritøkur og tað almenna taka hesar avgerðir grundað á, hvussu nógv tað kostar at framleiða tær ymsu vørurnar, og hvussu nógv brúkararnir eru hugaðir at gjalda fyri tær. Hvussu ein marknaður virkar, t.e. hvussu prísurin fyri vøruna ella tænastuna, sum verður handlað á marknaðinum, verður ásettur, er tí eitt sentralt evni í samfelagsbúskaparfrøðini.

Virkisbúskaparfrøði fæst hinvegin við allar tær av-

Framhald á næsu síðu